VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið minni vindur av norði. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvssgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið sunnudagin;
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvssgul millum landnyrðing og landsynning og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +4 stig.

0. flokkur setast á stovn

Námsfrøðingar og lærarar mugu samstarva, um ein skilagóða avgerð skal takast um ein sokallaðan 0. flokk. Tað er komið fram í kvøld, í kjakfundi í Miðlahúsinum, har bæði umboð fyri Føroya Pedagogfelag og Føroya Lærarafelag vóru hjástødd.

Hóast fakfelagsgjógvin mangan hevur verið ógvuliga breið millum námsfrøðingar og lærarar, so tykist kortini breið semja verða um, at bæði námsfrøðingar og lærarar mugu uppí leikin, um ein skilagóð avgerð skal takast í samband við tilboð til seks ára gomul børn.

Í kjakfundi í Miðlahúsinum í kvøld er eingin ivi um, at semja er ímillum partarnar, at fleiri tilboð skulu gerast til børn í hesum aldri. Tosað var nógv um ein sokallaðan 0. Flokk, har børnini fáa høvið at brynja seg til fólkaskúlan og 1. Flokk.

Men júst hvussu hesin 0. Flokkur skal skipast, eru fleiri boð uppá.

Ein teirra, ið var hjástødd til kjakfundin var Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í skúlamálum, og hon vísti á, at mentamálaráðið hevur ætlanir um at taka hetta kjakið upp, nú landsstýrið setur fólkaskúlan sum heild á breddan.

- Eg kundi hugsað mær, at fingið eitt kjak um hetta, soleiðis, at vit, innan hálvtannað ár, kunnu taka eina avgerð um hvørt hetta er ein leið vit vilja fara, sigur landsstýriskvinnan í Mentamálum, Helena Dam á Neystabø.

Landsstýriskvinnan hevur eisini skipað fyri einum evnisdegi um júst hetta evnið, har útlendskir serfrøðingar geva sítt boð uppá hvussu ein 0. Flokkur skal skipast. Hesin evnisdagur verður í mai í ár.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-12
Nuuk	-9
Qaqortoq	-6
Ammassalik	-6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	7
Lerwick	4
Aberdeen	7
London	6
Tromsø	-1
Bergen	1
Oslo	-6
Stokkhólm	-1
Keypmannah.	-1
Helsinki	-9
Moskva	-4
Berlin	-1
Warzawa	-1
Kiev	-2
Bukarest	0
Paris	4
Madrid	8
Róm	11
Malorca	13
Athen	18
Malta	15
Tunis	19
Beijing	0
New Dehli	27
Bangkok	36
Jakarta	31
Sydney	--
New York	6
Miami	13
Los Angeles	14
Meksikobýur	22
Panama	--
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 972 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.

Komandi nátt:
Djúpr lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer norðureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 14/03 kl. 06⁰⁰ – 15/03 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,6°
Minsti hiti máldur í mars: -11,0° -
Mesti hiti máldur í mars: +11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,0 mm – mált frá 14/03 kl. 06⁰⁰ – 15/03 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mars: 38 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

12. mars	Mánin longst frá jørðini
15. mars	Tendring
23. mars	Fyrra kvarter
28. mars	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2010

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
18. mars	08:03	20:23	07:03	19:23	07:18	19:38	10:03	22:23	11:03	23:23	06:18	18:38	05:18	17:38	08:18	20:38	09:18	21:38	07:48	20:08	09:03	21:23
19. mars	08:44	21:05	07:44	20:05	07:59	20:20	10:44	23:05	11:44	-	06:59	19:20	05:59	18:20	08:59	21:20	09:59	22:20	08:29	20:50	09:44	22:05
20. mars	09:28	21:51	08:28	20:51	08:43	21:06	11:28	23:51	00:05	12:28	07:43	20:06	06:43	19:06	09:43	22:06	10:43	23:06	09:13	21:36	10:28	22:51
21. mars	10:17	22:43	09:17	21:43	09:32	21:58	-	12:17	00:51	13:17	08:32	20:58	07:32	19:58	10:32	22:58	11:32	23:58	10:02	22:28	11:17	23:43
22. mars	11:10	23:38	10:10	22:38	10:25	22:53	00:43	13:10	01:43	14:10	09:25	21:53	08:25	20:53	11:25	23:53	-	12:25	10:55	23:23	-	12:10